# Vit vóru betri

**B36-venjarin helt eftir dystin, at hansara lið so ruddiliga hevði uppiborið javnleikin - og kanska enntá víðari luttøku**

VENJARIN
*Jákup Mørk*

Hóast tey flestu mundu vera samd um, at hann hevði alla orsøk at vera nøgdur, so var talan um ein rættiliga vónbrotnan venjara, tá vit eftir dystin skiftu orð við Sigfríð Clementsen.

- Spyrt tú meg beint nú, so eri eg bittur um tapið. Vit stýra øllum fyrra hálvleiki, men vit gera tvey stór mistøk, sum teir skora uppá. Tað er ikki nóg gott.

*Og tit missa so eisini ein mann beint undan steðginum. Hvat royndi tú at siga spælarunum í steðginum?*

- Vit tosaðu um tað góða arbeiði, sum vit høvdu gjørt allan fyrra hálvleik, og vit vóru samdir um, at vit avgjørt ikki skuldu grava okkum niður, nú vit vóru ein færri. Og fyri at fyribyrgja hesum, valdu vit so at flyta ein mann longur fram.

- Sjálvur haldi eg eisini, at vit eru fantastiska raskir. Fyrstu ferð at FCM megnar at spæla bóltin runt, er okkurt um eitt korter eftir av dystinum. Og sjálvir klára vit eisini at skapa nakrar møguleikar. So ein 2-2 javnleik høvdu vit so ruddiliga uppiborið í dag.

*Tað tóktist eisini, sum orkaðu tit betri hesaferð, enn tit gjørdu í Herning?*

- Tað hevur meira at gera við umstøðurnar. Vøllurin her ger, at teir fáa minni ferð á sítt spæl, og tí fáa teir ikki trýst okkum eins nógv. Og so er tann í Herning eisini tveir metrar breiðari. Tað gevur altso 100 fermetrar meira at spæla á.

- Hartil haldi eg eisini, at vit eru eitt sindur frekari í dag. Vit liggja hægri við aftaru monnunum, soleiðis at vit í nógv størri mun koma niðan á vøllin.

### Errin

Stóri munurin millum liðini bæði var tó helst, at sum einstaklingar vóru gestirnir tað lítla pettið betri, skjótari og sterkari. Og partvíst viðgekk Sigríður eisini, at so var.

- Tosar tú um kropsliga styrki í nærdystum, so eru teir kanska betri fyri, men eg haldi kortini, at vit vinna teir flestu nærdystirnar. Men tá bóltarnir koma innfyri, so fáa teir kanska seinasta fótin á, men hinvegin, so fáa teir ikki mál burtur úr sínum innleggum í dag, so eisini har fingu vit eitt betri tak á teimum, helt Sigfríður.

Men hóast alt, so viðgekk Sigfríður, at hann var errin av sínum monnum, sum hann helt fremja eitt fantastiskt liðavrik, har eingin skuldi takast framum annan.

- Hatta var eitt liðavrik allan vegin ígjøgnum. Allir arbeiða sum leyvur, og tað var deiligt at síggja.

- Og tekur tú samanum og hyggur at, hvørjum vit spæla ímóti, so er hetta eisini flott. Spyrt tú meg í morgin, so eri eg sikkurt nøgdur um dystin, men beint nú er vónbrotið stórt, segði venjarin, áðrenn hann at enda staðfesti, at góðu avrikini í Europa nú skuldu flytast yvir til landskappingina.

- Tað er tað avgjørt týdningarmesta hjá okkum nú. Vit skulu føra avrikið her yvir á landskappingina, og har er málið púra greitt. Vit skulu vinna hvønn tann einasta av teimum sjey dystunum, sum eru eftir. Hvørki meira ella minni.



*- Spyrt tú meg í morgin, so eri eg sikkurt nøgdur um dystin, men beint nú er vónbrotið stórt, segði Sigfríður Clementsen eftir dystin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Toppskjútti hjá B36

**Hóast hann bert er 20 ára gamal, so hevur Bergur Midjord longu nú fingið serstøðu, tá tosast skal um altjóða uppgávur hjá B36. Og hóskvøldið var hann aftur millum teir allar besta í einum sonnum liðavriki**

MÁLSKJÚTTI
*Jákup Mørk*

Við trimum málum í teimum trimum UEAF-Cup dystunum, sum hann hevur spælt í ár, er einki løgið í, at Bergur Midjord hevur vunnið sær eina sterka støðu í hópinum hjá B. Verður árið í fjør talt við, siga hagtølini fýra mál í fimm dystum, og hóast hann eisini hevur sýnt máltev í heimligu kappingini, so ber hetta boð um ein spælara, sum trívist framúr væl á grasi. Einum undirlagi, sum ofta setir eyka krøv bóltførleikan og tað at hugsa skjótt. Júst nakað sum eyðkennir Berg, og eisini hóskvøldið taldist hann millum avgjørt bestu menninar í einum framúr liðavriki hjá B

Og sjálvur helt hann eisini, at ein partur av frágreiðingini var, at tá slíkir dystir eru á skránni, so gevur mann kanska tað lítla pettið eyka.

- Tað er í øllum førum lætt at seta seg upp til ein slíkan dyst. Tað er jú eitt lið úr superliguni, sum vit skulu spæla ímóti, og sjálvur var eg eisini sera keddur um, at eg ikki fekk verið við í fyrra dystinum.

So hevði tað kanska eisini verið 2-2 har niðri?

- Ja, kanska, sigur hann stórflennandi.



*Avrikið og málini, sum Bergur Midjord hevur sýnt í europeisku dystunum, hava stutt sagt verið framúr. Ein spælari, sum hevur gjørt nógv um seg í heimligu kappingini, men sum serstakliga á grasi hevur sýnt dygdir sínar fram*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Valdu at satsa

Beftur var heldur ikki ósamdur í, at B36-liðið var sera væl tendrað til dystin, soleiðis at teir alt fyri eitt fóru hart inn í nærdystirnar. Nakað sum mótstøðuni ikki dámdi nakað serligt. Men tað, sum imponeraði einamest, var, hvussu spælið bleiv, eftir at B36 hevði mist ein mann. Hvat tosaði liðið um í hálvleikinum.

- Vit gjørdu av at flyta ein mann fram í álopið og annars hava tríggjar í verjuni. So skuldu vit so royna við longum bóltum, so vit kanska kundu skapa okkurt. Vit vildu niðan eftir vøllinu, so vit kundu vinna dystin.

Tann parturin eydnaðist so ikki, og ístaðin var tað FCM, sum kom víðari. Men hóast tað, so helt Bergur, at í B36 hava tey alla orsøk at vera nøgd um samlaða avrikið í kappingini.

- Tað eru vit heilt víst, og vit hava alla orsøk at vera ernir av hesum.

Og uppskriftin, hvør hevur hon verið.

- Vit hava givið alt. Vit hava verið væl skipaðir, vit hava ikki bakkað í nærdystunum, og so hava vit eisini roynt at spælt fótbólt.

*Tit hava heldur ikki tókst so bangnir, sum føroysk lið ofta eru. Hava tit arbeitt nógv við mentalu síðuni av hesum í ár?*

- Tað hongur helst meira saman við, at tað hevur gingið væl í landskappingini, og tí eru spælararnir væl fyri í so máta. Vit hava roynt at hildu fast um góðu gongdina, sum vit hava havt í Føroyum, og so hevur venjarin eisini verið sera dugnaligur til at fáa okkum at halda okkum til einstøku uppgávurnar. Teir lutirnir samanlagt hava nokk verið fremstu orsøkirnar til góðu úrslitini, helt Bergur Midjord at enda.